# Jens Pauli Heinesen 70 ár

**Sunnudagin verður skipað fyri hátíðarhaldi og stórari framsýning á Landsbókasavninum í sambandi við, at Jens Pauli Heinesen verður 70 ár. Og sama kvøld verður 1. partur av filminum um Sandavágsskaldið sýndur í Sjónvarpi Føroya**



*Gulla Øregaard hevur gjørt ein film um skaldið og persónin Jens Paula Heinesen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

FØÐINGARDAGUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Í sambandi við, at skaldið Jens Pauli Heinesen verður 70 ár týsdagin 12.november, skipa Landsbókasavnið og Rithøvundafelag Føroya fyri stórum hátíðarhaldi. Hátíðarhaldið í sambandi við føðingardagin verður á Landsbókasavninum sunnudagin klokkan 16. Á skránni verður fyrilestur, upplestur, sangur og heilsanir til Jens Paula Heinesen. Millum annað fer Eyðun Johannesen at lesa eina stuttsøgu eftir Jens Paula, og eisini fer dótturin, Elin Heinesen, at syngja nøkur løg. Jens Pauli Heinesen telist í dag millum fremstu høvundar í Føroyum og hevur latið úr hondum yvir 30 bøkur, skaldsøgur, søgusøvn og annað tilfar. Eisini hevur hann verið formaður í Rithøvundafelagnum eitt skifti í seksti- og sjeytiárunum.

Í sambandi við hátíðarhaldið á Landsbókasavninum letur eisini upp framsýning við handritunum til allan skaldskapin hjá Jens Paula. Talan er um sera rúgvusmikið tilfar, harav sumt ongantíð er givið út. Til høvið hevur Landsbókasavnið savnað øll handrit, ið Jens Pauli hevur skrivað, og harumframt allar virðislønirnar, hann hevur fingið millum ár og dag. Millum annað hevur hann fýra ferðir fingið M.A. Jacobsens heiðursløn. Eisini eru nógvar myndir at síggja á framsýningini, sum verður standandi frammi á Landsbókasavninum til mars mánað næsta ár. Framsýningin verður opin allar dagar, tá bókasavnið er opið.

### Filmurin frumsýndur

Sunnukvøldið fer Sjónvarp Føroya at senda 1. part av filminum um Jens Paula Heinsen. Filmurin hevur fingið heitið »Eitt dýpi av dýrari tíð«. Tvey ár eru síðan skjøtil varð settur á at gera ein film um og við Sandavágsskaldinum, og málið hevur alla tíðina verið at fáa hann lidnan til 70 ára føðingardag hansara. Tað er Gulla Øregaard, sum í samstarvi við Sjónvarp Føroya hevur staðið fyri arbeiðinum við filminum og sendinginum um Jens Paula Heinesen. Við ætlanini hevur hon sett sær fyri at lýsa rithøvundan sum skald og menniskja og tey kor, hann hevur havt at virka undir sum høvundur.

Í fyrsta parti av filminum verður nomið við almenna persónin - skaldið Jens Paula Heinesen. Í seinna parti, sum verður sendur 17.november, verður komið nærri at privatpersóninum Jens Paula Heinesen. Í filminum verður eisini høvi at hoyra eina nýggja innspæling av lagnum »Eitt dýpi av dýrari tíð«. Upptøkur eru gjørdar við einum symfoniorkestri úr Prag, Tórshavnar Manskór syngur og solistur er Elin Heinesen. Seinni í vetur fer Sjónvarpið at senda tríggjar sersendingar um skaldskapin hjá Jens Paula Heinesen. Í hesum sendingum verður m.a. kjakast um skaldskapin hjá Jens Paula, og annars um korini hjá føroyskum rithøvundum.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Urd Johannesen, urdjohan@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## »Body Worlds« í London

**The Anatomical Exhibition of Real Human Bodies.**

Tað var eitt sindur av tilvild, at eg endaði inni á hesari framsýning — var í veruleikanum bert í umráðnum fyri at hyggja meg um í tí indiska partinum av London, Brick Lane, har tað hvønn leygardag og sunnudag eru marknaðardagar og tá er nógv spennandi at síggja í hesum annars heldur trista býarpartinum. Eg hevði verið har vikuna framman undan og tá ið eg gekk framvið framsýningarhøllina, misti eg pippið av tí longu kø'ini. Eg havi ikki rættuliga funnið tolið, ið skal til fyri at standa í einari kilometurlangari kø í sniglaferð. Henda leygardagin var annaðleiðis, so eg fór inn, einki vitandi um, hvat fór at møta mær har inni.

Í veruleikanum eri eg komin higar til London fyri at læra um alt annað enn meg sjálva, soleiðis reint fakliga talað. Men tað, sum møtti mær á hesari framsýning, var eg sjálv, menniskjakroppurin í øllum hansara blóma og blóði. Tað byrjaði við smáum fittum beinagrindum, fingrarnir, tærnar, knøini, heilaskølturin og so við og við kom meira uppá beinini og liðirnar; æðrar, vøddar, innvølir, hjarta, eygu, húð og hár. Satt at siga hevði eg torført við at 'kapera', at hetta vóru verulig menniskju, sum høvdu donerað teirra likam til hetta prosjektið, hvørs grundarlag týskarin Gunther von Hagens skapaði í 1978 á lærda háskúlanum í Heidelburg. Grundarlagið er ein sokallað 'plastinate' mannagongd, sum viðger organini á menniskjanum á ein slíkan hátt, at alt blóð, vatn og feitt fer úr og á henda hátt verða organini varðveitt betur. Henda mannagongd sigst vera slóðbrótandi innan læknavísundina, tá ið tað snýr seg um læruna av mannakroppinum. Tað var undarligt at ganga her henda dagin og vita, at eyguni, tú hugdi at, einaferð eisini høvdu hugd at onkrum, ja kanska at tær ella mær?

Skaparin av menniskjakroppinum man vera eitt tað størsta og klókasta listarfólkið í "heiminum (?)", ja, orsaka, eg havi torført við at finna tey røttu orðini, sum kunnu lýsa, hvat fyri niðurstøðu, eg kom til meðan eg gekk her ímillum okkum. Beinagrindin við hennara meira enn 200 beinum og 100 liðum er sterkari enn tað sterkasta cementið og vigar bert ein fimtapart so nógv. Um allar okkara blóðæðrar vórðu lagdar saman úr enda í annan vildu tær rokkið tvær ferðir runt um ekvator. Um lunguni vórðu flatað og beidd út, høvdu tey dekkað eitt 100m2 stórt areal. Hóast slíkir faktuellir upplýsingar vóru sera áhugaverdir, so var tað heldur tað, ið eygað sá, sum var tað mest spennandi við hesari framsýning. Kroppurin á fólkunum var sýndur fram á ein sera listarligan og til tíðir stuttligan hátt, á onkrum vóru vøddarnir at líkna við veingir, sum vóru heftir á beinagrindina. Á onkrum øðrum var øll húðin hongd yvir armin. Og hóast eg til tíðir helt tað verða eitt sindur skakandi, so var hetta í veruleikanum líka so nógv ein listaframsýning av menniskjakroppinum sum ein læknafrøðilig framsýning. Og júst tí varð hon spennandi, tí hon setti menniskjakroppin í eitt annað perspektiv enn tað, vit vanliga hugsa um. Sum kvinna hevði eg tað nú ikki so lætt, tá ið eg kom til tann partin av framsýningini, sum vísti bert mánaðargomul fostur, nøkur heilt vanskeplað meðan onnur vóru heilt 'vanlig' men tó ikki fingu lív lagað. Eisini lá ein kroppur av einari kvinnu við uppskornum búki við einum lítlum 8 mánaðargomlum barni í móðirlívinum. Kundi ikki lata verða við at hugsa um ta vanlagnu, sum hevði rakt kvinnuna, barnið og tey, sum stóðu eftir við ongum. Deyðin var eyðsýndur alla staðni, serliga har lívið ongantíð hevði veruliga vunnið. Men onkusvegna kláraði ein fyri tað mesta at síggja burtur frá hesum dapra bardaga og hyggja eftir og verða hugtikin av tí, sum varð víst fram. Framsýningin hevur higartil vitjað í Týsklandi, Japan, Eysturríki, Sveits, Belgia og Onglandi. Yvir 9 milliónir fólk hava hugt eftir framsýningini og upp til 60 skúlaflokkar vitja hvønn dag. Nevnt verður í skránni, at framsýningin er sera væl egnað til skúlafrálæru. Um nakar heima í Føroyum fær áhuga at fáa tilfar til vega, kann hetta gerast ókeypis við at senda teldupost til exhibition@plastination.com og meira upplýsing er at finna á www.bodyworlds.com Kanska tað er vert at hyggja eftir sær sjálvum viðhvørt við øðrum eygum ella eygunum hjá øðrum?

# ítróttur

Nr. 216 • leygardagur • 9. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 5 | 5 - 0 - 0 | 122 | 99 | 23 | 10 |
| 2 | VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 117 | 104 | 13 | 6 |
| 3 | StÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 126 | 127 | -1 | 6 |
| 4 | Neistin | 6 | 2 - 1 - 3 | 116 | 122 | -6 | 5 |
| 5 | Kyndil | 5 | 2 - 0 - 3 | 132 | 123 | 9 | 4 |
| 6 | Stjørnan | 5 | 1 - 1 - 3 | 96 | 105 | -9 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 1 - 0 - 4 | 102 | 131 | -29 | 2 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 4 - 0 - 2 | 186 | 152 | 34 | 8 |
| 2 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 168 | 150 | 18 | 8 |
| 3 | StÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 148 | 131 | 17 | 8 |
| 4 | Kyndil | 6 | 4 - 0 - 2 | 177 | 165 | 12 | 8 |
| 5 | KÍF | 6 | 2 - 0 - 4 | 151 | 153 | -2 | 4 |
| 6 | H71 | 5 | 2 - 0 - 3 | 115 | 132 | -17 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 6 | 0 - 0 - 6 | 140 | 202 | -62 | 0 |

## Oddabrak í Vági

**StÍF má hálva vegna roknast sum favorittur, nú VB má vera Daiva Tuomaite fyriuttan, eftir at hon fekk reytt kort í dystinum móti Kyndli**



*Daiva Toumaite hjá VB fekk reytt kort móti Kyndli, og tí má VB vera týdningarmikla leikaran fyriuttan, tá tær um vikuskiftið spæla oddadyst ímóti StÍF*

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað mundu vera fá, sum undan kappingini roknaðu við, at toppdysturin í bestu kvinnudeildini fór at verða í Vági millum VB og StÍF, men hetta er tó støðan, nú grundspælið er um at vera hálvrunnið.

VB hevur higartil vunnið fimm dystir á rað, og eru í løtuni púrasta leysar í oddinum, og tað halda tær eisini fram við at verða, hóast talan ikki skuldi verið um sigur sunnudagin.

### StÍF favorittur

Hjá StÍF var byrjanin hinvegin heldur varligari, men eftir teir báðar sigrarnar á VÍF og Neistanum hevur liðið brádliga markera seg sum seriøsur biðil til oddasessin, og megna tær triðja dystin upp í slag at fáa fulla úrtøku, fer tað av álvara at síggja heilt spennandi út á vestara arminum av Skálafjørðinum, har menninir sum kunnugt eisini eru heilt væl við í oddastríðnum.

Og tó at VB er ósigrað higartil í kappingini, so eru ávís tekin um, at tað helst eru StÍF, sum eiga at roknast sum favorittar. VB er nevnliga ógvusliga skert er reyða kortið, sum Daiva Tuomaite fekk seinasta vikuskifti, og tá liðið hartil dregist við skaðum hjá øðrum týðandi leikarum, eins og bonkurin ikki er tann breiðasti í landinum, so er væl hugsandi, at hetta kann fara at geva teimum trupulleikar. StÍF tykist hinvegin vera sera væl fyri. Asta Petrauskiene og Alina Olaru hava í senastu dystunum skorað nærum eftir vild, og tá kontraspælið við serliga Annu Mariu Berthelsen og Paulu Olsen so eisini koyrir, skal hampuliga nógv til, áðrenn StÍF verða steðgaðar, so tað røkist av álvara fyri einum lívligum dysti í VB-høllini.

### Mugu fylgja við

Einki er at ivst í, at bæði VÍF og Kyndil vóna, at StÍF megnar at koppa VB í Vági. Júst hesi bæði liðini hittast í Vestmanna sunnudagin, og har kann vinnarin av dystinum toga seg nærri oddinum, um væl vil til.

VÍF fekk í Klaksvík aftur smakkin av einum sigri, og tað er einki at ivast í, at tær aftur hesa ferð seta nøsina upp eftir tveimum stigum. Ráð eru ikki til at missa ov nógv afturat, um liðið skal gera sær vónir um at endurvinna meistaraheitið.

Kyndil er ikki minni hart spent undan undan vikuskiftinum. Avrikini hjá liðnum hava verið sera misjøvn higartil, og skulu tær gera sær vónir um at vinna VÍF, mugu tær helst finna tað allar besta fram. Hetta var bert sjónligt í løtum móti VB, og hesar løtur skulu í øllum førum leingjast, um liðið skal gera sær vónir at koma úr Vestmanna við nøkrum.

## KÍF vil í oddin

**Tað má bera ella bresta hjá kollfirðingum, nú teir sunnudagin taka ímóti StÍF, sum higartil hevur sýnst vera sterkasta liðið í mansdeildini**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Líkt er til, at kollfirðingar veruliga ætla at taka sær um reiggj, nú teir í vetur skulu spæla heimadystirnar í Hoyvíkarhøllini. Eftir eina heldur laka byrjan er ferð veruliga komin á seinastu dystirnar, og sunnudagin stendur kanska størsta uppgávan higartil fyri framman, tá StÍF kemur á vitjan.

Strandingar hava higartil sýnt, at teir kanska eru sterkasta liðið í landinum, og einki er at ivast í, at teir hava huga at taka enn eitt fet móti hesum heiðrinum sunnudagin.

Lætt verður tað tó undir umstøðum, og tað kann meira enn so henda seg, at Marian Cirloganescu fær ein høvuðsleiklut í spurninginum um, hvørt hetta skal eydnast ella ikki. Enn hevur í øllum førum eingin megnað at steðga nýggja stórskjúttanum hjá KÍF, Damir Oros, og skal nakar málverji vera førur fyri hesum, so má tað helst verða Marian, sum uttan iva er besti málverjin í landinum, tá lagið er tað rætta.

Í Vestmanna hittast VÍF og H71, og her einki at ivast í, at heimaliðið er stórfavorittur. Eftir heldur svingandi avrik í fyrstu dystunum, vant VÍF mikukvøldið burtur úr Kyndli, og verður lagið hitt sama sunnudagin, skulu hoyvíkingar vera fegnir, bara teir sleppa undan stórtapið.

Júst svingandi avrikini hjá VÍF kunnu hinvegin viðføra, at H71 kanska kann spæla ein leiklut í dystinum, og sleppa teir fyrst upp í part, so verður talan kanska ikki um so lættan dyst hjá VÍF, sum pappírið annars boðar frá.



*Stórskjúttin hjá Kollfirðingum, Damir Oros, sleppur um vikuskiftið at royna seg í torførastu uppgávuni higartil, tá hann skal royna at banka bóltarnar framvið Marian Cirloganescu*